

*B36 gjørdist fyrsta liðið, sum megnaði at taka stig frá tvørámonnumhetta kappingarárið*

# Tvørámenn steðgaðir

*Sigursrøðin hjá TB steðgaði, tá teir leygardagin máttu lúta fyri teimum næstbestu hjá B36*

JÁKUP MØRK

B36-TB 5-1 (1-0)

Tvørámenn hava í ár sett sær fyri, at nú skal besta lið teirra aftur upp í fyrstu deild at spæla, og eitt nú kundi leiguavtalan við Óla Johannesen eisini bent á, at nakað er um prátið hjá teimum.

Tað skal tó beinanvegin sláast fast, at um tvørámenn skulu gera sær nakrar vónir í so máta, er alneyðugt at teir vísa meira sannførandi spæl, enn talan var um leygardagin.

**Steðgaði uttan Óla**
Næstbesta liðið hjá havnarmonnum vann nevnliga stórsigur á tvørámonnunum, og hóast tað ikki var fyrr enn seinasta korterið ella so, at ballónin skrædnaði, so mundi tað eftir dystin ikki vera stórvegis ivi um, at rætta liðið hevði vunnið.

Teir á heimaliðnum løgdu bragdligari fyri, og longu eftir átta minuttum hevði Rógvi Róin lagt B36 fram um.

Ein hin størsta orsøkin til yvirvágina hjá heimaliðnum mundi verða, at Klæmint Matras hevði fingið til uppgávu at mansverja Óla Johannesen, og hesin liðurin av spælskipanini eydnaðist sera væl. Landsliðsmaðurin, sum enn ikki tykist vera komin rættuliga fyri seg eftir skaðan, varð hildin í sera stuttum tjóðri allan fyrra hálvleik, og hetta darvaði spælinum hjá TB almikið.

Hóast B36 sostatt hevði gott tak á, so fingu teir ikki næsta málið fyrr enn tíðliga í seinna hálvleiki, tá Håkon Lundholm, sum spældi ein heilt góðan dyst, setti bóltin í netið.

Nakað seinni eydnaðist tað Einari Petersen at minka um munin, og líkt var tí til, at nakað av spenningi kortini skuldi koma í dystin.

B36 hevði tó framhaldandi tamarhald á, og avgerðin fall, tá 18 minuttir vóru eftir at spæla. Håkon slapp púra leysur móti málinum, og tá hann dróg framvið málverjanum, vórðu beini tikin undan honum. Brotsspark og reytt kort til málverjan, og tá Karl Leonsson var ósvikaligur frá 11 metra-blettinum, var so at siga alt avgjørt.

Seinastu løtuna kundi Håkon Lundholm og Johnny Samuelsen staðfesta sigurin.

**Nógv skal betrast**
Hóast greiða ósigurin, so kunnu tvørámenn kortini ikki avskrivast í uppflytingartosinum enn. Nógvir dystir eru framvegis eftir at spæla, men sum nevnt í byrjanini, so skal annað spæl finnast fram, um teir ætla sær í fyrstu deild, fyri ikki at tosa um, at verða verandi í bestu deildini, um teir nú koma so langt.

Kanska er eitt sindur torført at meta um styrki teirra, nú fleiri mans eru úti við skaðum, men støðan verður neyvan betri, tá Óli Johannesen fer av aftur landinum. Um TB tá fær annan leikara í hansara stað, má tíðin so vísa.

**B36-Sumba 5-1 (1-0)**
1-0 Rógvi Róin
2-0 Håkon Lundholm
2-1 Einar Petersen
3-1 Karl Leonssen
4-1 Håkon Lundholm
5-1 Johnny Samuelsen

Dómari: Tummas Pauli Olsen

# B68 fylgir við í toppinum

*1. deild: Súni Fríði Johannesen var høvuðsleikari, tá sandoyingar stríddust fyri at javna og síðstu løtuna vórðu sektaðir*



*Einki er at taka seg aftur í, at Súni Fríði var stóra hetjan á Svangaskarði sunnudagin. Her er hann á veg fram við Bernhardi Petersen, meðan Eli Hentze spentur fylgir við gongdini*

***Mynd: J. Jacobsen***

B68-B71 3-1 (1-1)

Súni Fríði Johannesen gjørdist høvuðsleikari, tá B68 í góðveðrinum á Svangaskarði sunnudagin tyngdi posan við trimum stigum afturat.

Álopsmaðurin, sum í ár er komin aftur til B68, eftir at hann síðani á sumri í 1997 hevur verið fyrst í NSÍ í eitt hálvt ár og so í HB í tvey ár, skoraði øll trý málini í 3–1 sigrinum á sandoyingum.

Sandoyingar, sum hava ta styrkina, at teir kenna sínar avmarkingar, vóru varnir í útgangsstøðuni. Teir vóru komnir á Toftir fyri at varðveita stigið, teir høvdu við. Tað eydnaðist teimum at halda tætt í 35 minuttir. So fór eitt mál ígjøgnum, men í fyrstu atløgu var ikki neyðugt at sleppa taktikkinum og at leggja á meiri álopskendan bógv. Bara tríggjar minuttir eftir B68 leiðslumálið javnaði miðvallarin Julian Florescu, tá B68 málverjin ikki megnaði at verja fyri frísparki úr spískum í høgru.

**Skaprskjúttin**
Súni Fríði Johannesen skoraði fyrsta málið í 36. minutti:

– Álopsmakkarin hjá mær, Marcello, átti sín lut í málinum. Hann var við uppá tað, tá eg dró upp á tvørs uttanfyri brotsteigin. Tá eg royndi at spæla eitt tvey, brúkti hann hælin, og eg gjørdist púra leysur í brotsteiginum, greiðir væl nøgdi álopsmaðurin hjá B68 frá.

Súni Fríði hevur onkuntíð áður skorað trý mál í einum og sama dysti. Síðsta ferðin, at tað kom fyri, var í síðsta umfarinum í 1998, tá HB slerdi FM heitið fast við at vinna 10–1 í Fuglafirði. Ta ferðina skoraði Súni Fríði, sum við átjan málum í alt gjørdist næstbesti málskjúttin í deildini (Jákup á Borg skoraði tjúgu) fýra mál.

Næsta málið fekk Súni Fríði í 67. minutti:

– Tað var ein eitt sindur óvanlig støða. Eftir deyðbólt og aftur og fram endaði bólturin í høgra borði, har vinstri vongverjin hjá okkum, Jákup Eli Olsen, legði innfyri við høgra beini. Eg var púra leysur sjey metrar úr málinum, og tað var lætt at skora.

Síðsta málið kom í næstsíðsta minuttinum:

– Tá høvdu sandoyingar í eina góða løtu trýst fyri at javna. Burtursæð frá at Jógvan Jón Petersen royndi seg við góðum stútara høvdu teir ikki nógvar upplagdar møguleikar, sjálvt um teir fingu nógv hornaspørk, greiðir Súni Fríði frá.

Síðstu løtuna var verjuparturin hjá sandoyingum tunnur. Liðformaðurin hjá B68, Fróði Benjaminsen, sendi langan bólt fram, og so var Súni Fríði púra leysur:

– Aftasti maður hjá teimum, Jón Brekku, satsaði við takling, tað miseydnaðist, og so var eg púra leysur í vinstru. Valdemar kom út ímóti. Eg haldi, at hann roknaði við, at eg fór at royna at fáa bóltin framvið honum. Men í staðin lyfti eg uppum hann, og tað var ein deilig kensla at síggja bóltin fara í málið.

Skulu vit rokna við, at tú í fleiri øðrum dystum fert at skjóta fleiri mál?

– Tað snýr seg um, at liðið hjá okkum skal vinna. Eg eri annar av álopsmonnunum, og bæði eg og Marcello vita, at tað verður roknað við, at vit leggja upp og skora mál. Eg haldi, at tað gongur rætta vegin. Tíðliga í ár hevði eg ein skaða, sum gjørdi, at eg fekk ikki vant í tríggjar vikur. Hetta hevur havt við sær, at antrittið, sum er so týdningarmikið fyri álopsspælarar, ikki hevur verið, sum tað átti at verið, men tað er betri nú.

Og fara tit at blanda tykkum í toppstríðið?

– Tað vóna vit. Men tað verður strevið. Longu fríggjadagin hava vit eina sera torføra uppgávu í Klaksvík. Skulu vit vera við í oddastríðnum, so skulu vit fáa nógv stig undan summarfrítíðini. Hópurin hjá okkum er so mikið lítil, at tað fer at kennast meint, tá leikbannini fara at gera um seg. Móti B71 vóru bæði Jan Petersen og Eyðstein Skipanes skaddir, og tað merktist væl. Vit hava einar tríggjar ungar og evnaríkar spælarar, men ofta roynist tað ikki væl, um tað er neyðugt at leggja ov stórar byrðar á so ungar spælarar, heldur væl nøgdi álopsmaðurin hjá B68, sum fyribils gleðir seg um undanvindin á Svangaskarði (í dammstillum summarveðri!).

JH

B68-B71 3-1 (1-1)
1-0: Súni Fríði Johannesen 36.
1-1: Julian Florescu 39.
2-1: Súni Fríði Johannesen 67.
3-1: Súni Fríði Johannesen 89.

Dómari: Lassin Isaksen

**B68:**
Magnus Poulsen – Mannbjørn Nesá, Jan C. Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Marlon Jorge, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, Øssur Jacobsen – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino

**B71:**
Valdemar Nowisci – Rúni í Soylu, Bergleif Sólsker, Jón Brekku, Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen – Kári Nielsen, Julian Florescu, Høgni Hansen – Eli Hentze, Alex Nielsen





*Leingi vóru runavíkingarnir væl við í dystinum móti VB, men skaðar hjá lyklaspælarum órógvaðu móti endanum, og hesum megnaðu vágbingar at gera sær dælt av*

***Mynd: Áki Bertholdsen***

# Skaðar kostaðu

*1. deild: NSÍ megnaði ikki at skipa seg nóg væl, eftir at tveir av lyklaleikarunum noyddust av vøllinum, og so kundu vágbingarnir tryggja sær trý stig afturat*

JÁKUP MØRK

VB-NSÍ 3-1 (0-0)

At prátið hjá vágbingum um at blanda seg meira í oddin hetta kappingarárið ikki bara hevur verið reyp, tykist nú vera próvfast.

Vágbingar hava, fýra umfør eru leikt, lagt seg á triðovasta sessin á stigatalvuni, og var tað ikki fyri ótrúliga avrikinum hjá B71 málverjanum fyri fjúrtan døgum síðani, høvdu vágbingar verið einsamallir á næstovasta sessinum.

**Trýstu nógv**
Vónbrotið um tapið móti sandoyingum mundi tó vera skúgvað til viks sunnudagin. Runavíkingar, sum undan dystinum vóru ósigraðir, komu nevnliga á vitjan, og hóast tað enn er nakað tíðliga á árinum, so var ein sigur sera týdningarmikil fyri báðar partar, tí við hesum kundu teir halda sambandi við líka til oddaliðið, sum hevði eina á pappírinum lætta uppgávu á heimavølli.

Tað var skjótt greitt, at vágbingarnir undir ongum umstøðum ætlaðu sær, at stigini skuldu fara av aftur oynni, og alt fyri eitt løgdu teir eitt stórt trýst á NSÍ.

Runavíkingar megnaðu tó at standa ímóti trýstinum, og verður sæð burtur frá einstøkum skotroyndum, høvdu vágbingarnir ikki teir heilt stóru málmøguleikarnir.

Hinvegin hevði trýstið eisini við sær, at NSÍ hevði ógvuliga ilt við at fáa glið á sítt spæl, og tó var nakað langt millum royndirnar hjá teimum.

Sum hálvleikurin leið, fekk NSÍ tó betri tak á. Eisini fingu teir nú okkurt høvið til at skjóta upp á mál, og eitt av hesum skotum noyddi eisini Bjarna út í fulla longd.

Fyrra umfarið endaði tó málleyst, og hóast positivu gongdina móti endanum av hálvleikinum, so mundu runavíkingar ikki vera ónøgdir um hetta.

**Dreymabyrjan**
Seinni hálvleikur kundi nærum ikki fingið eina betri byrjan, sæð við eygunum hjá gestunum. Seinni hálvleikur var ikki minutt gamal, tá Dánjal Hansen úr 18 metra fjarstøðu langaði bóltin í netið.

Hóast skelkin um málið, so royndu vágbingarnir kortini at spæla sítt egna spæl, og eftir lítið korter, gav hetta eisini úrslit.

Venjarin hjá runavíkingum, Trygvi Mortensen, var tó alt annað enn fegin um verjuspælið, tá Robert Cieslewicz slapp at stinga bóltin inn um verjuna, so VB-venjarin, Krzystof Popczynzki kundi fáa javnvág í roknskapin.

Bæði liðini royndu nú hvør í sínum lagi at avgera dystin, men líkt var kortini til, at liðini vóru somikið javn, at javnleikur skuldi gerast úrslitið.

Tá góðir 10 minuttir vóru eftir, noyddist Djóni N. Joensen tó av vøllinum við einum sonevndum trælærið, og løtu seinni var túrurin komin til Gert Langgaard, sum somuleiðis fór haltandi av vøllinum.

Runavíkingar vórðu tí noyddir at seta tveir nýggjar mans inn, og áðrenn hesir høvdu leikt seg heitar, høvdu vágbingar gjørt sær dælt av støðuni og lagt seg á odda.

Teir leiktu seg ígjøgnum úti í síðuni, og tá sent varð innfyri, var altíð vandamikli Jón Pauli Olsen fyrstur á, so VB nú var á odda.

Sum vera man, so royndu runavíkingar nú at trýsta, fyri at fáa í øllum førum annað stigið við sær, men ístaðin slerdi VB kontra, so dysturin varð avgjørdur.

Eftir mótálop varð bólturin stútaður móti málinum, men Sjúrður Jacobsen vardi fyri við hondini.

Reytt kort til Rúna, og tá Krzystof eftirfylgjandi setti brotssparkið í netið, var dystrin at kalla avgjørdur.

Seinastu minuttirnar hendi millum lítið og einki, heimaáskðararnir kundu sostatt fegnast um fyrstu stigini á heimavølli hetta kappingarárið.

**VB fylgir við**
Sum nevnt, so hevur VB nú leikt seg upp á triðja plássið á stiatalvuni, hóast HB við sigri í útsetta dystinum móti FSV kann skumpa teir eitt pláss longur niður.

Komandi vikuskiftið verður tað júst HB, sum verður mótstøðuliðið hjá vágbingum, og hóast hetta kann tykjast sum stórur biti, so hava vágbingar havt sera góð úrslit móti júst HB seinnu árini.

Við tapinum fullu runavíkingar aftur á sætta plássið, men hetta kann broytast, um teir sunnudagin megna at fáa trý stig burtur úr lokaluppgerðini móti GÍ. Kunnu teir tað, eru teir aftur væl við í kappingini um fremstu plássini.

**VB-NSI 3-1 (0-0)**
0-1 Dánjal Hansen 46.
1-1 Krzystof Popczynzki 58.
2-1 Jón Pauli Olsen 80
3-1 Krzystof Popczynzki (br.) 89.

Dómari: Kim Ejdesgaard

**VB:**
Bjarni Johansen - Predrag Zivkovic, Janus Kjærbo, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen - Jón Peuli Olsen, Milan Kuljic, Tórður Holm, Palli Augustinussen - Krzystof Popczynzki, Robert Cieslewicz

**NSÍ:**
Rúni Joensen - Brynjálvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Sjúrður Jacobsen - Gert Langgaard, Djóni N. Joensen, Dánjal Hansen, Jónstein Petersen - Ian Højgaard, Mortan Hansen

# GÍ legði fót fyri fuglfirðingar

*2. deild: Sigursrøðin hjá ÍF steðgaði, tá GÍ kom á vitjan*

ÍF–GÍ 0–0

Flovisligt. Tað var niðurstøðan hjá fuglfirðingum, tá næstbesta liðið hjá gøtumonnum leygardagin hevði steðgað sigursrøðini hjá ÍF.

Og tað var væl skiljandi, at teir í góðveðrinum í Fuglafirði vóru eitt sindur flovir. Tí um grannarnir fyri uttan Varmakeldueið høvdu verið eitt vet hepnari, so kundu teir verið farnir til hús við øllum trimum stigunum. Í 2. hálvleiki raktu teir bæði í stólpan og tvørtræið aftanfyri Allan G. Joensen.

ÍF hevði øll góð kort á hondini. Og tað í orðsins sanna týdningi, tí tvær ferðir í 2. hálvleiki vísti dómarin, Eiler Rasmussen, gøtumonnum reyða kortið.

Tíðliga í 2. hálvleiki helt hann seg meiri til reglarnar, enn so mangir aðrir dómarar gera. Eftir at tað var bríkslað fyri frísparki, hevði vongspælarin í høgru Bárður Heinason hug at skumpa eitt sindur til ein mótstøðumann, og tað fekk hann reyða kortið fyri.

Og tá tað restaðu stívliga tíggju minuttir, varð gøtumaðurin í ÍF verjuni, Alvi Justinussen, so harðliga takladur langt frammi á vøllinum, at dómarin metti tað vera til reytt kort, og so noyddist Hans Jákup á Líknargøtu at fara undir brúsu.

Men hóast teir vóru ellivu móti níggju, so megnaðu fuglfirðingarnir ikki at fáa mál. Stutt undan dystarenda hevði Tomek størsta møguleikan. Staddur mitt fyri málinum setti hann innaru síðuna á, men á strikuni aftanfyri Mortan Joensen bjargaði álopsmaðurin Heini Heinason.

Fuglfirðingarnir máttu harvið ásanna, at í fótbólti snýr tað seg ikki bara um at venja nógv. Mótstøðumenninir vístu teimum, at umframt venjingina, so er tað av stórum týdningi at hava royndar og snúðnar menn á liðnum.

Á GÍ liðnum vóru Jan Skoradal og Janus Rasmussen í verjuni, Símun Petur Justinussen var eisini við, og hesir vita væl, hvussu tað skal farast fram, tá mótstøðumenninir royna seg í 4–4–2 útgangsstøðuni. Teir megnaðu at pakka seg saman í verjupartinum, krossbóltarnir hjá fuglfirðingunum vóru ikki nógvir og neyvir, og gøtumenn vóru minst líka vandamiklir, tá teir fóru í snarálop – ikki minst Heini Heinason.

JH



*Fuglfirðingar hálvsnávaðu móti 9 gøtumonnum, men kortini halda teir fast um fremsta sessin á stigatalvuni*